## Grønlandsbankin gott úrslit

2009 var eitt gott ár hjá Grønlandsbankanum, hóast tað ikki royndist líka væl sum metárini 2006 og 2007. Ársroknskapurin fyri árið í fjør vísir, at bankin hevði góðar 100 milliónir krónur í avlopi fyri skatt, sum er knappar 30 milliónir krónur meiri enn í 2008. Stjórin í Grønlandsbankanum, Martin Kviesgaard, at úrslitið hjá bankanum er eitt tekin um, at í hesum krepputíðum er Grønland eitt gott stað at vera í. Hann sigur, at altjóða kreppan er eisini komin til Grønlands, men at grønlendski búskapurin er framvegis sterkur.



## Vænta nýggjar samráðingar

Hóast hvørki bretar ella niðurlendingar hava givið nakra tilsøgn um at endurskoða avtaluna við íslendingar um Icesave-skuldina, sigur íslendski fíggjarmálaráðharrin, at hann er bjartskygdur. Fyrr í vikuni hittu íslendsk umboð bretar og niðurlendingar, og í gjár umrøddi stjórnin støðuna saman við samráðingarnevndini, sum er í London. Aftaná segði Steingrímur J. Sigfússon, fíggjarmálaráðharri, at hann var tað, sum hann kallaði "varliga bjartskygdur" um, at tað fer at eydnast at fáa samráðingar um eina nýggja avtalu. Hann segði, at talan er um sera viðkvæmar tingingar.

Katrin Ottarsdóttir:

# Kenni meg aftur í filmunum

**Hennara portrett-filmar av trimum føroyskum lista-monnum eru kanska eins nógv eitt porett av henni sjálvari, við-gekk Katrin Ottars-dóttir í sending á DR í vikuni.**

FILMUR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Filmurin hjá Katrin Ottarsdóttir um Jóanes Nielsen vakti rættiligan ans, nú hann var frumsýndur í Danmark í vikuni.

Í hesum sambandi varð tosað við Katrin Ottarsdóttir í mentanarsendingini Kulturnyt á DR um tað at ein filmslistakvinna ger ein film um listafólk, sum so aftur er at meta sum eitt nýtt listaverk.

### Sjálvsportrett

Sambært filmskvinnuni kendi hon seg í nógvar mátar aftur í teimum trimum listamonnunum og tað hevur uttan iva sett dám á filmarnar, heldur hon.

- Nú aftaná dugi eg at síggja, at hesir filmarnir eins nógv eru eitt portrett av mær sjálvari – ella trý smærri sjálvsportrett.

Í sendingini greiddi Katrin Ottarsdóttir frá, at hóast hon ikki kendi teir allar, føldi hon seg alt fyri eitt á bylgjulongd við teir tríggjar listamenninar, Hans Paula Olsen, Tórodd Poulsen og Jóanes Nielsen.

- Felags fyri teir allar er, at teir eru føddir listamenn, sum frá byrjan vistu, at listin var eitt kall og at teir vildu verða stórir úti í verðini. Hatta kenni eg frá mær sjálvari, eins og eg eisini kenni til spurninginum um at vera verandi í Føroyum ella ikki. Jóanes valdi at vera verandi, meðan vit onnur ikki kundu sleppa vekk nóg skjótt – sjálvt um man tá næstan var at meta sum landasvíkjari, segði Katrin Ottarsdóttir millum annað.



*Nú aftaná dugi eg at síggja, at hesir filmarnir eins nógv eru eitt portrett av mær sjálvari, sigur Katrin Ottarsdóttir um síni trý filmsportrett av føroyskum listafólkum*

# Alexandur Kristiansen sett punktum

**Fimta og seinasta savnið í røðini við týðingum eftir Alexandur Kristiansen er júst komið út**

TÝÐINGAR
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Heili 132 yrkingar í týðing eftir Alexandur Kristinasen eru við í nýggja savninum *Filomela*, sum samstundis er tað seinasta í røðini, sum høvundurin fór undir at geva út miðskeiðis í nítíárunum.

### Eldri og nýggjar týðingar

Nógvar av týðingunum eru nýggjar, men eisini eldri týðingar hava fingið pláss í savninum. Onkrar av eldru týðingunum hava staðið í ymsum bløðum og tíðarritum, og høvundurin helt ikki, at tær bara skuldu fara í gloymskuna.

Onkrar av hesum týðingunum eru út við 40 ára gamlar og eru sambært savninum "leysliga týddar".




*Eldri og nýggjari týðingar eru savnaðar í seinasta savninum í røðini hjá Alexandur Kristiansen*

Í innganginum til savnið visir týðarin á, at illa ber til at at koma afturumaftur og bøta um eina yrking, tá hon einaferð er gjørd.

- Hesar leysligu týðingarnar víkja ofta frá upprunayrkingini, men eg havi valt at hava tær við, tí eg haldi, at tær rigga sum yrkingar, skrivar Alexandur Kristiansen.

Eins og í hinum søvnunum hevur hann bert tikið yrkjarar við, sum eru føddir fyri seinna heimsbardaga.

**Samlaða røðin sær soleiðis út:**

| | | |
|---|---|---|
| *Lógvalestur* | 33 týðingar | (1996) |
| *Anadyomena* | 66 týðingar | (1997) |
| *Veingir* | 99 týðingar | + 33 (2000) |
| *Ariel* | 66 týðingar | + 33 (2004) |
| *Filomela* | 33 týðingar | + 99 (2009) |

Tað er forlagið Sprotin, sum gevur savnið *Filomela* út.

# Jóanes Nielsen aftur á donskum

**Yrkingasavnið *Brúgvar av svongum orðum* er komið út í danskari týðing eftir bókmentafrøðingin og ummælaran á Information, Erik Skyum-Nielsen**

TÝÐING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

*Broer af sultne ord* er heitið á yrkingasavni eftir Jóanes Nielsen, sum kemur út í dag. Við í bókini er ein fløga, har Jóanes Nielsen lesur nakrar av yrkingunum upp umframt brot úr nýggja filminum um høvundan *Sporini vaksa úr orðum*.

### Uppiborðið útbreiðslu

Týðarin og bókmentafrøðingurin Erik Skyum-Nielsen, sum eisini stendur aftanfyri nýggju týðingina, hevur fyrr víst á, at lagnan, sum onkrar av bókunum hjá Jóanes Nielsen hava fingið, er ikki í samsvar við hansara dygdir sum rithøvundi.

- Eftir mínum tykki hevur Jóanes Nielsen avgjørt tað, sum skal til fyri at sláa ígjøgnum sum altjóða rithøvundur, segði Erik Skyum-Nielsen millum annað við Sosialin í fjør.

Tí undraðist týðarin eisini yvir, at bøkurnar hjá Jóanes Nielsen ikki hava fingið størri útbreiðslu uttanfyri Føroyar.

Tað verður tað so bøtt um nú, og sambært bókmentafrøðinginum Kim Simonsen er talan um eitt av bestu yrkingasøvnunum frá einum stórum føroyskum høvunda. Millum annað sigur Kim Simonsen soleiðis um savnið:

*Broer af sultne ord* snarar kring minnir og sterkar sansingar av erotikk, politikki og og deyða í einum tóna, sum er bæði skroypiligur og hartsláandi. Málsliga er okkurt matrielt yvir yrkingunum. Tað er, eins og bøkurnar hjá Jóanesi koma út við einum innbygdym anga av tjøru, smiðju og hamarssløgum, av lorti og anga av fisu – stutt sagt veruleikin uttan smakk av søtievnum, litevnum og e- numrum. Ein heimur hinumegin lívsstílsanalysir, samtalukøkar og Facebook"




*Nú fáa eisini danir høvi at lesa savnið "Brúgvar av svongum orðum", sum kemur út á donskum í dag við heitinum "Broer af sultne ord"*

Savnið, sum nú er týtt til danskt, var í uppskoti til Norðurlanda Bókmentavirðislønina í 2002

Tað er forlagið Torgard, sum gevur út *Broer af sultne ord*.